## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag og leygardagin:**
Fleyr til gul av landnyrðingi og kanska sirm eitt skifti, annars sólglottar. Hitin millum 3 og 7 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av norði og útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 2 og 5 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Hann veksur vindin upp í hvassan vind av norði og ælingur, sum frálíður kavi. Hitalagið verður millum +1 og ÷3 stig.

# Minnast listamann í Lítluvík

**Livdi listamaðurin Eyvind Dalsgaard, vildi hann fylt hundrað ár sunnudagin. Hendan merkisdag ætlar familjan at halda við framsýning í Smiðjuni í Lítluvík**


FRAMSÝNING
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*


Eyvind Dalsgaard eigur sín egna part av føroysku listasøguni. Hóast lívsleið hansara ikki gjørdist drúgv, so liva listaverk hansara víðari. Millum kendastu verkini hjá hesum sermerkta listamanni teljast Sjómaðurin, sum í dag er búmerki hjá Føroya Banka, og tað er eisini Eyvind Dalsgaard, sum er upphavsmaður til standmyndirnar á Glaðsheyggi.

Framsýningin sýnir fleiri av hansara verkum - bæði andlitsmyndir, tekningar og onnur listaverk. Hetta er fyrstu ferð, at verk hansara eru savnaði á einari framsýning.

Framsýnigin verður opin hvønn dag til 7. mars frá kl. 14 til 18.

### Fyriskipað framsýning

Eyvind Dalsgaard og kona hansara Sigrid fingu trý børn. Tað er dóttur Sigrid og Eyvind Sunneva Dalsgaard, sum hevur fyriskipað framsýningina.

– Tað hevur leingi verið ætlanin at skipa fyri einari framsýning. Verkini hjá pápa mínum hava ongantíð verið savnaði á einari framsýning, og helt hundrað ári dagin vera eitt hóskandi høvi, sigur Sunneva Dalsgaard.

Hon heldur tað vera sera spennandi fyri seg sjálva og at sleppa vísa øðrum listaverkini hjá pápa sínun, sum bæði siga eina søgu um ein sermerktan listamann, men eisini siga frá einari farnari tíð.

– Fólk hava víst mær ógvuliga stóran vælvilja við at lána mær ymist og siga mær frá um pápa mín. Hetta hevur verið ein ógvuliga spennandi verkætlan, sum eg vóni, fólk fara at taka væl ímóti, sigur Sunneva Dalsgaard.

Hon leggur stóran dent á, at øll eru hjartaliga vælkomin í Smiðjuna at síggja framsýningina.



*Sunneva Dalsgaard hevur tikið stig til framsýning í Smiðjuni í Lítluvík, sum letur upp leygardagin. Á framp sýningini vera verk eftir pápa hennara, Eyvind Dalsgaard, listamann.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tað er ikki nógv, Sunneva ella hini systkini minnast til pápa teirra. Sigrid og Eyvind untist bert at liva saman í 9 ár. Longu í desember 1952 doyði Eyvind bert 47 ára gamal, tey fingu 3 børn saman.

### Doyði ungur

Eyvind Axalson Dalsgaard varð føddur 1. mars 1905 á Mølini í Skálavík.

Foreldur hansara vóru Sunneva, fødd Poulsen úr Búri í Skopun og Axel Valdemar Dalsgaard úr Dalsgarði í Skálavík. Eyvind vaks upp millum átta brøður.

Eyvind leitaði sær seinni til Danmarkar í útbúgvingarørindum. Hann tók prógv sum búnaðarfrøðingur á Landbohøjskolen í Keypmannahavn.

Heimafturkomin til Føroya stutt fyri seinna veraldarbardaga gjørdist hann skrivari á Føroya Búnaðarfelag. Eyvind var kendur sum búnaðarfrøðingur, og hetta var lívsstarv hansara, men hann hevði, hóast sjúkur av disseminera sclerosu, sterkan lívsvilja. Millum annað skrivaði hann lærubók í búnaðarfrøði til ein komandi búnaðarskúla, sum ætlanin var at seta á stovn.

Eyvind var sjálvlærdur listamaður. Millum hansara listaverk finna vit Mannin við torvleypinum og konan við dylluni, húðaskógvar, ljósastakar og stampur, sum hann margfaldaði og seldi.

Maðurin sum situr og karðar. Andlitsmyndir av Hans Dalsgaard, Ólavi Dalsgaard, Hans Andr. Djurhuus, Sverra Patursson og Valdemar Lutzen.

Ein mynd, sum hann høgdi í gróti, stendur í garðinum í barnaheiminum á Mølini í Skálavík.

Eisini var hann kringur við blýantinum. Nógv minnast eisini kavahøvdið av Bjørnstjerne Bjørnson, hann gjørdi á vetri í 1944, sum stóð úti við Landavegin.

Fleiri av hesum verkum eru at finna á framsýningini.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -2 |
| Nuuk | 8 |
| Qaqortoq | 9 |
| Ammassalik | 1 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 5 |
| Seyðisfjørður | 4 |
| Tórshavn | 4 |
| Lerwick | 2 |
| Aberdeen | 1 |
| London | 2 |
| Tromsø | 0 |
| Bergen | -1 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | -4 |
| Keypmannah. | 0 |
| Helsinki | -10 |
| Moskva | -6 |
| Berlin | -0 |
| Warzawa | 2 |
| Kiev | 4 |
| Bukarest | 5 |
| Paris | 0 |
| Madrid | 0 |
| Róm | 11 |
| Malorca | 9 |
| Athen | 14 |
| Malta | 12 |
| Tunis | 16 |
| Beijing | 0 |
| New Dehli | 22 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | -- |
| New York | 2 |
| Miami | 23 |
| Los Angeles | -- |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 32 |
| La Paz | 9 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 33 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt hátrýst, 1037 hPa. við Føroyar stendur mestsum í stað. Ein hátrýstryggur haðani til Mið-Skandinavia viknar.




**Í dag:**
Hátrýstið yvir Íslandi stendur mestsum í stað. Eitt veikt brúgvalag yvir Norska Havinum fer suðureftir, men hevur lítið ella einki avfall við sær.


I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI


### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 23/2 kl. 06[00]–24/2. 06[00]. Hitin í gjár: 4,6°
Minsti hiti máldur í febr.: -11,0° - Mesti hiti máldur í febr.: 11,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 23/2 kl. 06[00]–24/2 kl. 06[00]
Avfallið higartil í februar: 62,6 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

25. februar

20. febr. Mánin longst frá jørðini
24. febr. Fullmáni
3. mars Seinna kvarter
8. mars Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 25. feb | 07.31 | 19.49 | 06.31 | 18.49 | 06.46 | 19.04 | 09.31 | 21.49 | 10.31 | 22.49 | 05.46 | 18.04 | 04.46 | 17.04 | 07.46 | 20.04 | 08.46 | 21.04 | 07.16 | 19.34 | 08.31 | 20.49 |
| 26. feb | 08.07 | 20.25 | 07.07 | 19.25 | 07.22 | 19.40 | 10.07 | 22.25 | 11.07 | 23.25 | 06.22 | 18.40 | 05.22 | 17.40 | 08.22 | 20.40 | 09.22 | 21.40 | 07.52 | 20.10 | 09.07 | 21.25 |
| 27. feb | 08.43 | 21.02 | 07.43 | 20.02 | 07.58 | 20.17 | 10.43 | 23.02 | 11.43 | - | 06.58 | 19.17 | 05.58 | 18.17 | 08.58 | 21.17 | 09.58 | 22.17 | 08.28 | 20.47 | 09.43 | 22.02 |
| 28. feb | 09.21 | 21.41 | 08.21 | 20.41 | 08.36 | 20.56 | 11.21 | 23.41 | 00.02 | 12.21 | 07.36 | 19.56 | 06.36 | 18.56 | 09.36 | 21.56 | 10.36 | 22.56 | 09.06 | 21.26 | 10.21 | 22.41 |
| 1. mars | 10.02 | 22.24 | 09.02 | 21.24 | 09.17 | 21.39 | - | 12.02 | 00.41 | 13.02 | 08.17 | 20.39 | 07.17 | 19.39 | 10.17 | 22.39 | 11.17 | 23.39 | 09.47 | 22.09 | 11.02 | 23.24 |

5 707265 100050 >